**Nr. 26/2014**

**Gunvør Balle**
**løgtingskvinna**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a.**

**Fyrispurningur um starvið sum skúlastjóri í Vesturskúlanum,**
**settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Nær ætlar landsstýrismaðurin at lýsa eftir stjóra til nýggja Vesturskúlan?
2. Um starvið ikki verður sett pr. 1. januar 2015, hvør er so ætlanin við skúlaleiðsluni á Venjingarskúlanum eftir 1. januar?

Viðmerkingar:
Mentamálaráðið er komið til ta niðurstøðu, at leiðandi starvsfólk í ráðnum er ógegnigt, og at ráðið alt sum tað er tí er ógegnigt í sambandi við stjórasetanina í Vesturskúlanum. Tí fór málið víðari til Løgmansskrivstovuna og haðani til landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Tórshavnar Kommuna hevur samtykt, at byggjast skal nýggjur Vesturskúli, sum skal koma í staðin fyri Kommunuskúlan og Venjingarskúlan.

Í løtuni situr enn ein stjóri í fyribilsstarvi á Venjingarskúlanum fram til 1. januar 2015, hóast umboð fyri foreldur og starvsfólk á Venjingarskúlanum mótmæltu avgerðini um, at nýggj fyribils leiðsla enn eina ferð skuldi setast mitt í einum skúlaári.

Tað hevur stóran týdning fyri samanleggingartilgongdina til ein nýggjan Vesturskúla, at allir partar kunnu hava álit á tilgongdini. Tað er sjálvsagt ikki nøktandi fyri Venjingarskúlan - ella fyri nakran skúla - at hava skiftandi fyribilssettar stjórar í longri tíð. Tí er neyðugt at fáa staðfest, um og nær ætlanin er at lýsa skúlastjórastarvið til samanlagda Vesturskúlan leyst, soleiðis at ein savnað leiðsla fyri samanløgdu stovnarnar kann fara undir at fyrireika bygging og samanlegging av báðum skúlunum.

**Á Løgtingi, 21. november 2014**

Gunvør Balle